# Lat málið liva og trívast í eini nútíðarverð

ROLF GUTTESEN



**Fríggjadagin hevði Marjun A. Simonsen eitt lesarabræv í Sosialinum, sum legði á uppskotið hjá Sjúrða Skaale um at gera vissar, eftir mínum tykki skilagóðar, smábroytingar í alfabetinum**

Allar broytingar eru til tað verra. Hetta er saktans niðurstøðan í skrivingini hjá Marjuni. Men fakta er, at at kalla eingin dugir at skriva (stava) rætt føroyskt, einamest tí at skriftmálið er so ævinliga langt frá talumálinum. Man skal vera magistari í filologi fyri at kenna orðanna uppruna, fyri at vita um tað einaferð fyri 500 ella 800 árum skrivaðist so ella so. Hesa vitan hava kanska eini 10 fólk. Tí er nærum ógjørligt hjá vanligum fólki at skriva reint føroyskt eftir akademisku, etymologisku hammerhaimbsku rættskrivingini, sum ein íslendingur gjørdi fyri hann.

**»Heimsatlas« sum faklig fyrimynd?**
Marjun framhevjar Heimsatlassið, sum Skúlabókagrunnurin útgav á sinni. Har »*eru øll heimsins lond latin í føroyskan málbúnað*«.

Hatta var einki framstig, men heldur størsta málspillingarroynd innan fakmál í nýggjari tíð. Hatta tiltakið var gjørt av vælmeinandi, men ókønum fólki, uttan nakra fakliga vitan, ella atlit til, hvat annars fer fram á altjóða øki um skriving av staðanøvnum í atlassum og annars.

**Gekkaskortar heldur enn rein andlit?**
Hví skulu staðanøvn, persónnøvn og onnur serlig nøvn bronglast í ein »føroyskan« búna. Hvat er rætt ella gott í tí? Eitt staðanavn er sum eitt andlit, tú kennir tað aftur. At lata tað í annan búna, er at geva tí ein gekkaskort ella kanska burka. Er tað tað, tit vilja?

Koyrir tú við einum GPS-ara í Svøríki og tastar Stokkhólmur inn, hvar manst tú so enda? Hví vil atlassið ikki brúka tað rætta navnið, sum sjálvandi er Stockholm?

Bara tvey dømi. Í Chile er høvuðsmálið spanskt, sum hevur tað latínska alfabetið sum grundarlag, eins og øll onnur vestureuropeisk lond og mál. Hví skal hetta landið hava ein ljótan gekkaskort um vakra andlitið og kallast Kili. Meiningsleyst, ópraktisk, frekt.

Og hví skal onkur amatørur sita og spæla sær og umseta og týða nøkur hissini staðanøvn í stóru Verð? Hví skula Cap Verde oyggjarnar kallast Grønhøvdaoyggjar í hesum merkiliga Heimsatlassi? Hví 'føroyskar' hann ikki øll oyggjanøvn. Sum Sulawesi og Sumatra, Lampedusa og Lesbos, Graciosa ella Gran Canaria? Øll staðanøvn – uttan undantak - hava ein týdning, eina meining, men tað gevur onga meining at 'lata tey í føroyskan búna.' Tað fer at virka sum ein burka.

**Bakslættur vegna dummheit?**
Hatta idioti'ið kann vendast ímóti føroyingum. Sum einaferð ein canadiari, við nøkrum føroyskum hjálparum, skrivaði vísindaliga grein um fiskivinnu í Føroyum. Har skrivaði hann um virkir í Contrary Point, Gentle Bay og Midway. Hann nevnir eisini Whale Cove, South Bay, Pig Bay, South Point og Pirate Cove. Bókin er uttan virði, tí eingin veit hvat hann tosar um, eingin kann finna leið eftir hesum tápuligu gekkaskortunum.

**Fak ella pseudo-fak?**
Fakmál - tað verði seg fysikk, kemi, matematikk ella hvat sum helst - skulu ikki »nationaliserast«. Hví læra eina »føroyska« matematikk ('støddfrøði' er bara lænt úr íslendskum, sum alt hitt skramblið) í Hoydølum, sum eingin annar forstendur? Sum onga aðrastaðni kann brúkast? Sum bara er til fortreð og stríð? Hví skula føroyskir studentar læra matematikk av nýggjum, tá teir koma til Danmarks Tekniske Universitet, DTU, ella Massachussets Institute of Technology, MIT, at lesa?

Tað er bara meiningsleyst. Og kemst av, at ein romantisk, nationalistisk klika hevur sett seg á málið, og oyðileggur faklig-heitina av ófakligum grundum.

**Koyr burt….**
»*Skal hetta arbeiði nú fara fyri skeyti?*« spyr Marjun við einum leiðandi spurningi um nevnda atlass. Mítt svar, og túsund við mær veit eg, er JA: Lat hatta makkverkið fara á Sandvíkahjalla, heldur í dag enn í morgin. Hatta var ein skeiv og ógongd leið.

Einki er meira natúrligt, enn at seta tað vanliga latínska alfabetið í hásæti, at hava tey neyðugu ískoytini, so sum onnur lond eisini hava. Hví stremba ímóti eini ódaðahraun í heimsins uttasta útjaðara, heldur enn at taka eina blomstrandi europeiska mentan til sín av álvara?

# Teir vunnu - fruktirnar økjast nú støðugt

JÓGVAN VIÐ KELDU



**Skulu vit hava eitt dynamiskt samfelag, er neyðugt at fáa nøkur størri nátúrlig øki við breiðari samfelagsstrukturi**

Einki er yvir at dylja, at seinastu framherjarnir fyri at fáa eitt valdømi ígjøgnum løgtingið, Edmund Joensen og Jóannes Ejdesgaard, fingu sín vilja við einum valdømi við hjálp frá útjaðaratingmonnum, sum antin høvdu egin áhugamál at verja, ella var hetta bara vanligur naivitetur. - Rætt ella skeivt fer søgan at tulka og viðgera.

Vanligt dynamiskt samfelag er nú einaferð uppbygt soleiðis, at so mangir tættir sum gjørligt eru umboðaðir í einum øki: privati sektorurin, útbúgvingarmøguleikar so mangir og langir sum tilber, barnaansing, livandi mentanarlív við ítrótti og øðrum frítíðarmøguleikum og almennir stovnar og umsitingar fyri at øki gerast undirbygd.

Landsstýriskvinnan í mentamálum hevði á orði ein dagin, at vit klára ikki fíggjarliga, tað sum londini uttan um okkum eru før fyri. Hetta er verulig staðfesting. Hinvegin, eftir at sentralisman seinnu árini hevur tikið dyk á seg, eru so mong, sum ikki eru vakin fyri hesum veruleika, tí sæst dagliga, at almennu stovnarnir í høvuðsstaðnum ikki hava skilt, at peningur ikki er til alt.

Eftiransingarstovnar eru bygdir omaná eina økta og fløkta almenna skipan, og sum danskur politikari segði, "kontrolørar til at ansað eftir kontrolstovnum". Samstundis, økjast útreiðslurnar skjótt til almenna bygnaðin, meðan vinnan á sjógvi og á landi í støðugum millumbilum liggur undir hóttafallum.

**Reiðarí og Visjón 2015**
Ein helt einaferð fyri, at "øll reiðararí í Føroyum vóru farin falitt", tá letur í einum ungum spøkum, sum var har: "Ja, men er tað ikki tey, sum halda okkum uppi? Hvussu hongur hetta saman?" – Hetta átti at verið nakað fyri okkara frøðingar! Nakað annað er so, at hetta bert lutvíst er rætt, tí tíbetur eru tað reiðarí, sum hóðraðu undan.

Okkara almennu loftmiðlar gera nógv burturúr, at nú er umráðandi, at vega- og tunlaætlanir skulu "leggjast á ís", tí ivasom vitanarvinna við landskassapeningi skal økjast, nú nærkast jú tann stóri dagurin, "Visjón 2015"!. – Hvar vóru okkara samferðsluviðurskifti ídag, um vitanarvinnukreftirnar fyrr høvdu fingið sín vilja? Vit høvdu hvørki Norðoyatunnilin ella Vágatunnilin og enn minni nakað annað.

**Dynamiska samfelagið**
Skal víðkast um eitt dynamiskt samfelag, er neyðugt, at skapa nøkur fá nátúrlig størri øki við einum breiðari samfelagsstrukturi út um landið. Ofta verður tosað um, at flyta stovnar. Hinvegin verður oftast gloymt, at meðan tosað verður um hetta, verður máað undan vælvirkandi stovnum úti um landið, og roynt at takað støði undan teimum.

Sigast má, at Edmund Joensen og Jóannes Ejdesgaard fingu sín vilja, hesin vilji varð skorðaður undir av tingfólki úr útjaðaranum. Vit hava enn bara sæð brotpart av doyvandi fruktunum, so kunnu John Johannesen og aðrir tosað um "baklandið úti um landið", men tað fer spakuliga í søguna, um ikki sjónlig og skjót broyting er at hóma.

Teir báðir vunnu men fruktirnar av "mine bange anelser" síggjast longu, væl skorðaðar undir av okkara almennu loftmiðlum, samstundis sum politikarar nú kunnu syngja við skaldinum mikla, Janusi Djurhuus "Eg sovi mær megi, eg sovi mær mátt!"

# Rættleiðing til John Johannesen

BJØRN KALSØ

løgtingsmaður



**Í Degi og viku hóskvøldið 27. august slapp John Johannesen, tingbólkaformaður í Javnaðarflokkinum at føra fram ósannindi**

**Ósannindi**
John skuldsetti fyrst ein embætismannabólk fyri at vera komin við ætlaðu sparingunum á pensiónsøkinum, síðan legði hann afturat, at tað var Sambandsflokkurin, sum umsat pensiónsmál. Sostatt vóru tað embætisfólk og Sambandsflokkurin, sum høvdu ábyrgdina av øllum verðsins ólukkum, ímeðan Javnaðarflokkurin bara hevði staðið fyri betringum.

Nei John, Javnaðarflokkuri eigur uppskotið í pensiónsmálinum

John Johannesen veit væl, at tað er floksformaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard og harvið Javnaðarflokkurin, sum í Ólavsøkuuppskotinum hevur skotið upp sparingar á pensiónsøkinum á 25 mió. kr. við at hækka pensiónsaldurin og við at mótrokna í pensiónini frá fyrst tjentu krónu.

Tað er eisini Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjrmálum, sum stendur fyri arbeiðnum, har politisku flokkarnir saman skulu gera eina pensiónsskipan, sum allir flokkar á Løgtingi og vónandi stórur meiriluti av fólkinum kunnu taka undir við.

Sambandsflokkurin fer ið hvussu er at gera alt fyri at fáa rættað uppskotið soleiðis til, at skipanin verður nøktandi og ikki gongur veikastu pensionistunum ov nær, soleiðis, sum tað nú liggur í kortinum.

Javnaðarflokkurin ætlaði at skerja blokkin við 117 mió. kr. og taka yvir fíggjareftirlitið.

John nevndi einki um ætlanirnar Javnaðarflokkurin hevði í CHE samgonguni at skerja blokkin við 117 mió. kr. og at taka yvir fíggjareftirlitið, sum hevði kollsiglt alt okkara peningakervi. John nevndi heldur einki um at Sambandsflokkurin bjargaði Javnaðarflokkinum frá sínum egnu vitleysu ætlanum, tá seinna ABC samgongan varð skipað.

Kanónirnar venda tí skeivt, tá skotið verður eftir embætisfólkum og Sambandsflokkinum.

**Munnkurv?**
Landsstýrismaðurin legði í tíðindaskrivi munnkurv á politisku skipanina pensiónsnýskipanini viðvíkjandi, tá politiska viðgerðin varð sjósett. Men nú eru javnaðarmenn sjálvir, fyrst Hans Pauli og nú John, á sjálvrósandi og lítið objektivan hátt, farnir at greiða almenninginum frá, hvussu fundirnir í Fíggjarmálaráðnum fara fram, og hvør kemur við hvørjum á fundinum. Somuleiðis verða allar óbehagiligheitir hongdar um hálsin á øðrum, meðan Javnaðarflokkurin verður lýstur sum tann, ið skal bjarga skipanini.

Ótrúligt! Minnir mest um eina roynd hjá Javnaðarflokkinum at stinga halan millum beinini og forkoma arbeiðnum við pensiónsskipanini, sum teir sjálvir varða av.

Sambandsflokkurin krevur at avvarandi partar verða hoyrdir leypandi

Kann tó leggja afturat, at Sambandsflokkurin fer at leggja dent á at tryggja, at pensiónsmálið ikki bert fer at verða viðgjørt í skýmaskotum millum politikarar úti í Alberthall. Tað hevur tí verið eitt avgerðandi krav frá flokkinum, at avvarandi partar leypandi og so skjótt sum gjørligt verða hoyrdir í málinum. Soleiðis at partarnir við teirra royndum og vitan kunnu koma við gevandi íkasti til arbeiðið, samstundis, sum broytingarnar av somu orsøk verða betur kjølfestar í fólkinum.